# Til London at lokka føroyingar



Fríggjakvøldið fer Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, at royna at lokka føroyskar førleikar í Bretlandi til Føroyar. Hetta er partur av eini ætlan hjá Tórshavnar kommunu at lokka fleiri borgarar við góðum útbúgvingum til kommununa. Sambært kommununi er ætlanin at lokka skattgjaldarar úr Evropiskum metropolum til Havnar. - Kommunan hevur sett sær fyri at kappast við útlendsku metropolarnar um ta best útbúnu arbeiðsmegina, og um talentini við teimum bestu royndunum og størstu drívmegini. - Kommunan vil hava fatur á so nógvum borgarum, sum tilber, ið kunnu vera við til at menna nýtt vinnulív og skapa nýggj arbeiðspláss, sigur Tórshavnar kommuna. Heilt konkret er ætlanin, sambært kommununi, at borgarstjórin skal tosa við útisetar í London, tá úrslitini frá útisetakanning millum føroyingar í London og Keypmannahavn, verða løgd fram har fríggjakvøldið. Borgarstjórin í Tórshavnar kommunu verður eisini røðari á útisetatiltakinum í London.

# kommunulæknar



*Føroyskir kommunulæknar eru ørkymlaðir av handfaringini av koppsetingini móti H1N1*
*tilvildarlig mynd*

hann til, at tá fólk hava havt eina sjúku, hevur kroppurin longu ment antievni móti sjúkuni, og at tað tískil ikki skuldi verið neyðugt at koppsett.

Eitt av argumentunum fyri at koppseta, er at sjúkan møguliga kann mutera seinni, og eisini hetta heldur Jenis av Rana vera heldur bíligt.

- Um H1N1 muterar, so er tað jú líka mikið, tí tá virkar henda koppsetingin als ikki, so tað nyttar einki at koppseta móti at hon møguliga kann mutera, vísir Jenis av Rana á.

## Oyðsla koppseting

Eitt annað, sum nógv eisini verður tosað um millum føroyskar kommunulæknar, er hví danska Heilsustýrið mælir til tvær koppsetingar, tá Heimsheilsustovnurin undir ST, WHO, mælir til eittans prik.

- Koppsetingin er mangulvøra í løtuni, og er tað so, at bert eitt prik er nokk, so sum WHO mælir til, so kunnu vit koppseta alt fleiri fólk við teirri mongdini, sum vit fáa, vísir Jenis av Rana á.

Hann heldur eisini, at um ein kundi ávíst við eitt nú eini blóðroynd, at viðkomandi longu hevur havt sjúkuna, og harvið hava antievnið í kroppinum.

- Vit burdu fingið avklárað, um hetta ber til. Hetta hevði so eisini kunna spart okkum fleiri túsund koppsetingar, Jenis av Rana dent á.

Hann sigur tó eisini, at hetta eru ting, sum hann als ikki hevur kannað enn, um tað ber til, men heldur eru tankar hjá honum sjálvum.

## Einki garanti

Eitt annað evni, ið hevur fylt nógv í prátinum læknanna millum og í miðlum uttanlands, er, at framleiðararnir ikki vilja standa inn fyri at koppsetingin virkar, ella at teir kunnu stillast til svars fyri møgulig hjáárin.

Hetta hava teir, sigst, fingið allar keypararnar at skriva undir upp á, áðrenn teir kunnu keypa koppsetingina. Orsøkin skal vera, at neyðuga tíðini ikki hevur verið til at gera nóg gjøgnumførdar kanningar.

- Hetta tykist mær sera ódámligt, staðfestir Jenis av Rana.




